**Fótbóltssamtakið Vágar**
**Stovna 18.12.1993**
**FO-360 Sandavágur**
**Tlf. 333287/Fax 332335**
**Formaður:** Árni Jacobsen

**Meistarar:** Ongantíð. Besta úrslit 6. pláss í 1995
**Steypavinnarar:** Ongantíð
**Greipuvinnarar:** Ongantíð
**Í 1. Deild (6 ár):** 1995-97, 2000-01, 2003-
**Í Europa:** Ongantíð

# Vágamenn skulu aftur vigast

**Seinast vóru teir alt ov lættir, men nú hava vágamenn styrkt um hópin, sum á pappírinum er bæði sterkari og breiðari sammett við liðið, sum flutti úr fyrstu deild**

JÁKUP MØRK



*Vágamenn halda seg hava sterkari lið hesaferð, enn seinast teir vóru í 1. deild.*

Mynd: Álvur Haraldsen

Tosið um felagsliðið í Vágunum tók seg av álvara upp av nýggjum, tá felagið í 2001 flutti úr bestu deildini. Tað var nú heldur ikki bara tað, at niðurflytingin var veruleiki, men heldur mátin, sum hetta hendi uppá. Í løtum var talan snøgt sagt um eyðmýking fyri leikararnar, og eitt nú var metstóra 15-0 tapið fyri B36 av slíkum slag, sum als ikki hoyrir heima í bestu deildini.

Hetta førdi við sær, at menn av álvara ivaðust í, hvørt felagsliðið hevði nakran sum helst møguleika at yvirliva. Um tað kanska ikki var betri, sum tað var fyrr, har bygdirnar í oynni høvdu hvør sítt lið, sum ofta ridlaðu ímillum tilverur í fyrstu og aðru deild.

Semja bleiv tó um, at royna eina ferð afturat, og tað er einki at ivast í, at royndin hesa ferð varð nógv betri skipað, enn hon so ofta hevur verið fyrr. Umframt vanliga styrkin við útlendskum leikarum, sum mest sum øll føroysk feløg við árunum hava fingið, fóru vágamenn nevnliga eisini í ferð við at savna saman leikararnar, sum tey áður hava sæð skift úr felagnum. Streymurin varð at kalla vendur, og eitt nú vóru leikarar sum Jens Erik Rasmussen og Bjarni Prior við á liðnum, sum í fjør vann seg syngjandi upp úr aðru deild, og í ár hava hesir so fingið felag av Jóhannis Joensen. Leikarar, sum vanliga hava verið settir í samband við oddin í føroyskum fótbólti, men sum nú eru komnir at styrkja lokala felagið.

Og tað er ikki bara leikliga, at hesir styrkja felagið. Einki er at ivast í, at sálarliga ávirkanin av hesum er stór. Á vøllinum kann teirra nærvera avgjørt vera góð hjá yngri og minni royndum leikarum at stuðla sær at, og uttan fyri girðingina er einki at ivast í, at sponsorar og aðrir stuðlar fáa munandi øktan hug at hjálpa felagnum. Altso ein positiv ringrás, sum tað nú ræður um at halda fast í hjá vágamonnum. Kunnu teir tað, so átti felagið so avgjørt at kunna lyft seg upp millum tey stóru í landinum, men tað er ein uppgáva, sum krevur bæði hart og drúgt arbeiði.

## *Leikarahópur*

Tølini, sum eru viðmerkt, siga, hvussu nógvar dystir/mál leikarin spældi/gjørdi fyri felagið í 2002, og hvussu nógv (gul-reyð) kort leikarin hevur fingið í sama tíðarskeiði.

| Navn | Í fjør | Landsdystir | Áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Málverjar** | | | |
| Jóhan á Mýrini | 1/0 | | |
| Jákup Joensen | 12/3 | | |
| **Verja** | | | |
| Alexander da Silva (BRA) | 14/0 | | |
| Jack Johansen | | | |
| Albert Ari Thomassen | 12/0 | | |
| Johannis Joensen | | 13/0 | HB |
| Sjúrður Ellefsen | 13/1 | | |
| **Miðvøllur** | | | |
| Hannus Olsen | 13/1 | | |
| Vladlens Osipov (LET) | 17/3 | | |
| Jens Erik Rasmussen | 18/8 | 25/2 | HB |
| Rói Árting | | | HB |
| Elfinn Ørvarodd | 13/2 | | |
| Eyðfinn Fjallsbak | 11/1 | | |
| Ragnar Niclasen | | | |
| Ruslan Screlea (MOL) | 14/4 | | |

| Navn | Í fjør | Landsdystir | Áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Álop** | | | |
| Birgir Joensen | 9/1 | | |
| Kim Poulsen | 16/4 | | |
| Bjarni Prior | 18/8 | | B36 |
| Petur Niclasen | 1/0 | | |
| Clayton do Nascimento (BRA) | | | |
| **Tilgongd** | | | |
| Johannis Joensen | 17/1 (3-0) | HB | |
| Rói Árting | | HB | |
| **Frágongd** | | | |
| John Johansen | 16/4 | Givin | |
| Sonni Johansen | 15/2 | Givin | |
| Arturas Ramouska | 16 | Uttanlands | |
| **Venjari** | | | |
| Jens Erik Rasmussen | | | |





*– Eg var kanska eisini komin har til, at eg hevði tørv á eini broyting. Eg hevði verið sjey ár í HB, og har hevði eg sum so roynt alt tað, sum eg ynskti mær, sigur Jóhannis Joensen, sum nú spælir fyri FS Vágar.*

Mynd: Álvur Haraldsen

# Við til at endurskapa álitið

**Tað ræður fyrst og fremst um at bíta seg fastan í bestu deildini, soleiðis at álitið á liðið kann endurbyggjast, heldur Jóhannis Joensen, sum nú aftur er at síggja í FS Vágum**

JÁKUP MØRK

Meistaraheitið hjá HB var ikki meira enn komið til høldar, áðrenn tað ljóðaði, at Jóhannis Joensen helst ikki fór at vera í reyð/svarta búnanum longur. Eftir sjey ára útlegd í Havnini, vóru lokalu røturnar aftur farnar at draga, og nakað seinni stóð eisini greitt, at skiftið til FS Vágar var veruleiki.

Tá vit nú hitta sterka verjuleikaran, og spyrja hann um orsøkina til skiftið, ásannar hann, at tað sjálvandi hevði nakað við lokalu kensluna at gera, men samstundis leggur hann áherslu á, at tað so ikki bara var talan um reina idealismu.

– Tað er í øllum førum so, at vóru teir ikki í bestu deildini, so var eg ikki farin her at spæla. Men tá tað er sagt, so haldi eg eisini, at nógv spennandi er hent í felagnum, síðani niðurflytingina fyri tveimum árum síðani. Ítróttarliga hevur leiðslan í felagnum satsa nakað, og nú verður málið so í fyrstu atløgu at stabilisera seg í bestu deildin. Og í øllum førum gera tað betri, enn tað varð gjørt seinast, heldur hann.

– Eg var kanska eisini komin har til, at eg hevði tørv á eini broyting. Eg hevði verið sjey ár í HB, og har hevði eg sum so roynt alt tað, sum eg ynskti mær. Eg havi verið bæði føroyameistari og steypavinnari, og sjálvt um tað sjálvandi altíð er stuttligt, so blívur tú onkursvegna eitt sindur mettur. Tað skal ikki takast, sum eg á nakran hátt eri hástórur, men eg haldi, at støðan var soleiðis, at eitt meistaraheitið afturat í sjálvum sær ikki hevði verið nakað mál. Tað hevði verið eitt gullmerki afturat, og so ikki nógv meira enn tað.

– Hetta gjørdi so eisini, at eg nú hevði hug at royna nakað nýtt, og so er tað sjálvandi nærliggjandi at koma aftur til Vágarnar. Eg kundi helst eisini farið aðra staðni at spælt, men eg havi jú spælt her fyrr, og við undirsjóvartunlinum er ferðingin ikki longur nøkur forðing. Tað tekur ikki meira enn 20-25 minuttir at koyra til venjing, og tað er nú ikki so nógv meira enn fleiri fólk í Havn hava til arbeiðis.

## Álitið

Og tá tosið so fellur inn aftur á liðið, sum nú aftur skal royna seg í bestu deildini, tykist tað eisini, sum um Jóhannis er hampuliga bjartskygdur.

– Eg skal ikki siga, at vit fara at leggja okkum út í oddaastríðið, og tað haldi eg eisini, at vit eiga at gera okkum greitt. Fyrst og fremst ræður tað um hjá okkum at stabilisera liðið sum fastan part av bestu deildini. Tað ræður um at skapa álit á liðið. Bæði fyri at vit á tann hátt kunnu fáa lættari við at styrkja um hópin og halda egnum leikarum, og ikki minst fyri sponsorarnar.

– Tað er jú í veruleikanum ein roynd at skapa eina góða ringrás. Skalt tú vera við í oddinum, so kostar tað pening, men um sponsorar og aðrir stuðlar ikki hava álit á liðnum, so hava teir ilt við at gera eina íløgu í hetta, og tá skapar tú eina ónda ringrás.

– Júst tí er tað týdningarmesta hjá okkum at endurskapa álitið á Vágoynna í fótbóltshøpi. Tað er einki at ivast í, at potentialið er har, men tað í sjálvum sær er ikki nóg mikið.

## Landsliðið

Umframt at hava vunnið heiðursmerki av ymsum slag við HB, so hevur Jóhannis seinnu árini eisini verið millum føstu leikararnar í landsliðshópinum.

Og fyri tað, um hann á pappírinum nú er komin á eitt veikari lið, so er hetta ikki nakað, sum hann hevur ætlanir um at sleppa.

– Tað haldi eg sum so ikki hevur nakað við liðið at gera. Fyri tað um tú spælir á einum oddaliðið, er tað einki garanti fyri, at tú ert nóg góður til landsliðið, og hinvegin er einki til hindurs fyri einum landsliðssessi, um tú ikki ert á einum oddaliði. Sjálvur havi eg altíð hildið, at tað er avrikið á vøllinum, sum er avgerandi, og hvat venjingarstøðu viðvíkur, so haldi eg avgjørt, at vit eru væl við her vesturi.

– Ikki soleiðis at skilja, at eg nærum skal tvíhalda um mín sess, tí í sjálvum sær er tað ikki nøkur vanlukku at missa ein landsliðssess, tá mann kortini hevur verið við so leingi. Men eg kenni meg framvegis at vera væl fyri, og verði eg úttikin, so ætli eg mær avgjørt at vera við har eisini, sigur Jóhannis Joensen at enda.